**Heimarøktin og Serforsorgin**

# Suðuroy

## Stuðlar til Stuðulsskipanina fyri vaksin

Stuðulsskipanin fyri vaksin fevnir um alt landið, og hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan. Harumframt eru røktaruppgávur, sum eru skipaðar í samstarvi við Heimarøktina.

Stuðulskipanin fyri vaksin ynskir stuðlar, ið m.a.:

- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og einsamøll í heimi brúkarans og samstundis eisini kunnu átaka sær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión
- vísa áhuga og virðing og samstundis vera professionellir
- eru stuðlandi og hjálpa brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum
- eru sterkir - bæði til sálar og likam

Søkt verður eftir stuðli/um til at arbeiða við 3 brúkarum í búgva í **Suðuroyar sunnaru helvt:**

**Kvinna við sálarligum trupulleikum:** Uppgávurnar eru m.a. at stimbra henni í teimum dagligu uppgávunum í heiminum og at fáa ein innihaldsríkan dagligdag. Talan er um 4 tímar um vikuna.

**Kvinna við Scelerosu:** Uppgávurnar eru m.a. at stimbra henni í teimum dagligu uppgávunum í heiminum og at fáa ein innihaldsríkan dagligdag. Tímatalið er ikki ásett enn.

**Maður - menningartarnaður:** Uppgávurnar eru m.a. at stimbra honum í gerandisdegnum og at fáa ein innihaldsríkan dagligdag. Talan er um 4 tímar um vikuna.

Ynskiligt hevði verið at fingið ein stuðul til allar uppgávurnar. Tó er møguleiki fyri at søkja tey einstøku størvini hvør sær.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar ið hava útbúging sum pedagogar, terapeutar, heilsurøktarar, heilsuhjálparar hava fyrimun til hesi størv.

Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primært ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá pedagogfelagum.

**Lønar- og setunartreytir:**
Talan er um størv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi dag-, kvøld, og vikuskiftisarbeiði.
Løn sambært áðurnevndu yrkisfeløgum og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita hjá serráðgeva, Odu Johansdóttir, ella Fía Jespersen, tlf: 344020.

Umsóknarfreist til hesi størv er 6. apríl 2005.

Umsóknir saman við útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
ums. suðuroyar sunnara helvt
Løkjatún 1, F0 -160 Argir
Tlf. 354020 - Telefax 354021

---

**Gøtu Kommuna**

# Kunngerð

## um framløgu av broytingaruppskotum í býarskipan og byggisamtykt fyri Gøtu kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinri broytingum hevur kommunustýrið á fundi tann 21. mars 2005 samtykt at gera broytingar í býarskipanini og byggisamtyktini fyr Gøtu kommunu.

**Broytingarnar eru :**
**Í Norðagøtu**
verður partur av verandi vinnuøkinum í Gøtudali og partur av matr. nr. 196 a og matr. nr. 51 a, Norðagøtu lagt út til eitt serstakt C1 øki til vinnu- og miðstaðarendamál.

C 1 økið fær í byggisamtyktini hesar ásetingar :

1) Økið verður lagt av til vinnu-, handlar og skrivstovuhølir.

2) Bygningar kunnu í mesta lagi vera í 5 hæddum.
Kjallarahædd verður roknað við, um loftið er meiri enn 1,0 m yvir hægsta jørðildi, mált av lendi í náttúrligari legu við húsahorn.

3) Byggistigið má ikki fara upp um 0,5.

4) Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 1,0.

**Í Syðrugøtu :**
verður eitt øki merkt B1 av matr. nr. 215 a, Syðrugøtu lagt út til alternativa íbúðarbygging.

Fyri B1 øki skal støddin á grundstykkjum ikki verða minni enn 150 m2 .

Byggistigið má ikki fara upp um 0,5

Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 1,0

Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.

Broytingarnar, ið eru lýstar við litaðum kortum, hanga uppi í gongini á kommunuskrivstovuni til almenna eftirskoðan í vanligu upplatingartíðunum frá 29. mars til og við 21. apríl 2005.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi tann 30. juni 2005.

**Gøtu kommuna**
21.03.2005

---

# Lærlingur

Søkt verður eftir einum lærlingi til Málingahandilin í J. C. Svabosgøtu og einum lærlingi til málingadeildina í Vøruhúsinum á Hjalla.

Arbeiði umfatar sølu av máling og málingatilfari o.l.

Eru spurningar, kunnu tygum ringja tlf. 342500.

Skrivlig umsókn í seinasta lagi 4. apríl 2005 at sendast til:

**LITAVAL P/F**

Postboks 1019
110 Tórshavn

---

# Nólsoyar Fornminnisfelag

Hevur aðalfund við Brunn sunnudagin 3. apríl 2005 kl. 16.00.

Skrá sambært lógina.

**Nevndin**

---

# Toyota Avensis til sølu

2.0 turbo Diesel. Árg. 28. febr. 2001. Sera væl hildin. Sær gott út. Eitt sett av sportfelgum fylgir við.

Prísur kr. 160.000.

**Tlf. 424185, 332452 ella 282375**

---

# Handils/skrivstovu høli til leigu í Havn

Hølini sum eru í veghædd eru umleið 170 fermetrar til støddar.

**Ring tlf. 221577**

---

# Handil til sølu

Í Vesturbýnum um nøktandi boð fæst.

3-4 ársverk.

Skriva til Sosalurin, Box 76, 110 Tórshavn

**Bill. mrk. 0055**